# Miðlamjarr

LAGT TIL RÆTTIS: Eyðun Klakstein

Ég haldi, at hatta er tyggigummi.

Sjónleikarin Paris Hilton við løgregluna, tá hon varð tikin við kokakini uppi á sær





Eingin meining er í at framleiða útella sjónvarp, um so er, at lurtarin og hyggjarin festa seg við persónin, ið ber fram, heldur enn tað, ið borið verður fram.

Dimmalættin í oddagrein um dialektir í føroysku loftmiðlunum. (Dimma)

Taki synd í frensinum, hann gongur og halta, sikkurt verið í bardaga við ein annan frens, sum ikki veit av, at "Garfield" ikki er nakar rivalur. Bleiv geldur fyri næstan tveimum árum síðani

***Kvinna, 55 ár***

Mínir egnu verjuspælarar hava skatt meg mest. Higartil hava teir kostað mær 22 pentur.

Danski málmaðurin Brian Jensen um hansara samstarv við sína egnu verju (Euroman)





Av og á heldur tú einum menniskja í tínum hondum. Tú hevur ávirkan á, hvør lagnan verður, tí tey hava sjálvi einki vald.

Kristianna Hammer, granskari, um týdningin hjá fólki í heilsuverkinum at varðveita vónina hjá sjúklingum.

Eri við at fáa propp av hasum meylinum um dialektir. Er tað nakað nýtt, at vit hava dialektir í Føroyum – og er tað nakað nýtt, at dialektir fána so hvørt, sum fólkið í oyggjunum blandast, og fólkatalið minkar? Hvør fuglufr syngur við sínum nevi, so leingi dialektirnar eru til. Amen.

***Maður, 50 ár***

Sambært Dátueftirlitinum er tað eitt problem hjá summum, at tannlæknin sendir teimum sms og minnir tey á avtaluna, og at bilverkstaðið sms'ar um, at nú er bilurin liðugur. Eg, sum kann vera nokk so gloymskur, sigi bara: Meiri av hesum!

***Maður, 50 ár***



Tú skalt verða svakur, tí sálarliga krevur tað ómetaliga nógv av tær.

Livar Nysted um ferðina í lítlum róðrarbáti tvørtur um Atlantshavið (Sosialurin)



Tá ein listamálari málar eina mynd, so er tað hann, sum einsmallur ger av, um myndin skal verða ljós ella døkk.

Jóannes Eidesgaard, landsstýrismaður, heldur, at Vinnuhúsið málar við alt ov myrkum litum, tá støðan í samfelagnum skal lýsast.



Og Ingolf Olsen, sum gjørdi innslagið, er sjálvur við Finni Fríða

Verturin í Degi og Viku eftir eitt innslag um fiskiskapin hjá Finni Fríða

Eg biði øll, sum koyrdu aftan fyri meg á Hoyvíksvegnum, at orsaka meg. Ein megastórur eitikoppur klættraði brádliga upp á rattið, og koyringin bleiv, sum hon bleiv...

***Kvinna, 40 ár***